# NEATA festivalurin settur

**Í gjár byrjaði NEATA festivalurin, sum er tað størsta sjónleikatiltakið, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum**

NEATA FESTIVALUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tríggir dreingir standa og kjakast um, at tveir teirra júst hava sæð huldufólk. Hin triði trýr ikki uppá tílíkt. Tá koma nakrar álvagentur í kjóla dansandi til teirra. Tær dansa og forføra. Dreingirnir verða meir og meir býttir uppií teimum. Inntil nakrar gentur brádliga koma rennandi og skúgva álvagenturnar til viks, so tær ikki skulu fanga dreingirnar.

Hetta brot er tikið úr leikinum »Menniskja og tey fornesku« ið Dramaverkstaðið hjá Hjørdis Johansen framfórdi.

Her kemur ein flokkur av ungdómum út á eitt stað, har tey møta ymiskum verum úr teimum gomlu føroysku sagnunum.

Leikurin var fyrsta framførsla á NEATA festivalinum, sum er størsta sjónleikatiltak sum hevur verið í Føroyum.

Um 120 áhugasjónleikarar úr Norðurevropa luttaka á festivalinum, sum varðar í eina viku. Sjónleikararnir eru úr Føroyum, Íslandi, Noregi, Svøríki, Danmark, Hetlandi, Estlandi, Lettlandi og Litava.

Festivalurin varð settur í Norðurlandahúsinum í gjárkvøldið av Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra. Hann vónar at allir luttakararnir fara at fáa nakað burturúr festivalinum og fáa íblástur frá hvør øðrum, hóast luttakaralondini eru sera ymisk.



*Kópar komnir upp á land at dansa í leikinum hjá Dramaverkstaðnum*

## Petur Meinhard Ellebye Andersen, 19 ár



Petur Meinhard er ein av leikarunum í Dramaverkstaðnum, sum framførdi leikin "Menniskjan og tey fornesku."

*Hvussu var at framføra í kvøld?*

– Tað var ordiliga stuttligt at framføra, og tað gekk nógv betur enn væntað.Eg eri glaður fyri at tað gekk so væl.

*Hvussu leingi hava tit fyrireikað tykkum?*

– Vit hava vant leikin í tríggjar mánaðir. Men fyrr í dag høvdu vit ringar vónir, serliga tí at pallurin her í Norðurlandahúsinum er so nógv størri, enn har vit hava vant. Tað var ein ógvislig broyting av umhvørvi. Men tað var stórsligið at framføra á pallinum í Norðurlandahúsinum.

## Kristine Kreleberga, 19 ár, Litava



Kristine hevur spælt sjónleik síðan hon var 12 ára gomul og var við til tann fyrsta NEATA festivalin, sum var í Litava í ár 2000.

*Hví ert tú komin við til hetta tiltakið?*

– Tí mær dámar væl sjónleik og eg vóni eisini at møta vinarligum fólki. Eg haldi tað vera spennandi at koma til eitt annað land, og at læra nakað av landinum og mentanini og kanska eisini málinum at kenna.

*Hvat fært tú burturúr?*

– Eg fái sera góða orku at spæla sjónleik, og vit hava tað stuttligt. Eg fái eisini samband við eitt annað land og vóni at fáa nýggjar vinir.

Sjónleikaliga vóni eg at kunna geva nakað til hini ígjøgnum okkara framførslu, og eg vóni eisini at fáa nakað aftur, tá eg siggi framførslurnar hjá hinum.

# Stuttligt at røra seg

**Í fimleikahøllini á Venjingarskúlanum standa trettan fólk mitt á gólvinum og gera dansivenjingar**

NEATA FESTIVALUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Hetta er undirvísing í performance dansi, sum Kristina Sørensen skipar fyri, sum er ein av teimum fyrstu "workshoppunum" ið luttakararnir á NEATA festivalinum kunnu velja at vera við til.

Heidi Madsen, 20 ár úr Danmark, er ein av luttakarunum á workshoppini.

*Hví valdi tú hesa workshoppina?*

– Tí at her skulu vit røra okkum. Tað er stuttligari enn at sita og lurta eftir fyrilestrum.

Heidi Madsen hevur spælt sjónleik í fýra ár, men brúkar vanliga ikki dans í sjónleikinum. Tað væntar hon heldur ikki at hon fer at gera framyvir.

– Eg dansi í dag, tí tað er hugnaligt og eisini ein góður møguleiki at fáa størri felagsskap við hinar luttakararnar.



*Heidi Madsen*

# Ein festivalur er nakað serligt

Hilmar Joensen er formaður í MáF, sum hevur skipað fyri at fáa NEATA festivalin til Føroya.

– Vit vildu gjarna hava festivalin til Føroya, tí tað er nakað serligt við festivalum. Tað er deiligt at so nógv fólk koma saman. Tey eru úr ymiskum londum, men øll práta við hvønn annan, eisini um onnur evni enn sjónleik. Vinarbond verða knýtt og luttakararnir kunnu læra av hvørjum øðrum.

– Hvønn seinnapart meðan festivalurin er, skipa nøkur kend sjónleikafólk fyri tjaki, har tosað um sjónleikirnar, ið vóru framførdir dagin fyri. Her fara vit afturum sjónleikin, so luttakararnir eisini kunnu læra av tí.

– Tað hevur stóra ávirkan á sjónleikalívið í landinum, at vit kunnu fáa festivalin til Føroya. Øll sum eru við fáa íblástur, og tað skapar eisini ein hug at fara út um landið við sjónleikinum.

Millum annað er MáF í ferð við at skipa fyri einari verkætlan saman við Noregi og Svøríki, har børn og ung úr hesum trimum londum fara at spæla sjónleik saman næsta ár.



*Hilmar Joensen, formaður í MáF*